# Ætla bæði at fáa pengar í kassan og eitt upplivilsi

**Leygarkvøldið fer Tórbjørn Jacobsen at selja Jóannes Eidesgaard, Hergeir Nielsen, Hendrik Old, Johan Dahl, Øssur Mohr og onnur**

UPPBOÐSSØLA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit ætla bæði at fáa pengar í kassan og at geva fólki eitt stuttligt upplivilsi.

Tað er ætlanin við einum forvitnisligum tiltaki hjá Tvøroyrar Svimjifelag á Jóansøku í ár.

Felagið hevur skipað fyri eini málningaframsýning í hølunum í miðbýnum, har Búðin helt til, beint yvirav Statoilstøðini.

Har hava bæði kend og ókend latið málningar inn og teir verða seldir á uppboðssølu leygarkvøldið kl. 22.

Eru summir av málarunum ókendir, er uppboðshaldarin alt annað enn ókendur, tí tað verður ongin annar enn litríki løgtingsmaðurin, Tórbjørn Jacobsen, sum skal fer at standa fyri uppboðsøluni.

Og tað átti at borga fyri eini stuttligari løtu. Viðrar, verður uppboðssølan uttandura.



*Mikkalina Simonsen ger klárt til málningaframsýngina. Myndina vinstrumegin hevur Birita í Dali málað og hina, Eva Lauritsen*

Kendasti málarin á framsýningini er øssur Mohr. Men so eru tað eisini tey lokalu Palle Julsgart og Rannvá Mortensen, sum hava málað.

Men politikarar hava eisini latið málningar inn, so er tað nakar, sum vil hava ein Jóannes Eidesgaard, ein Hendrik Old, ein Johan Dahl ella ein Hergeir Nielsen á veggin í stovuni, er bara at møta upp á uppboðssøluni.

Onnur, sum hava málað, eru Arngerð Joensen, Terji Hentze, Terji Nielsen, Katrin Einarsson, Pól Olsen og Reidar Simonsen- men kanska koma onnur afturat.

Opið verður í kvøld frá klokkan 18 til klokkan 22 og leygarkvøldið frá klokkan 14 til klokkan 21. So hava tey ein tíma at gera klárt í til uppboðsøluna klokkan 22.

Sunnudagin verður opið frá 15-19.

# Nýggj pubb og kafé í gomlum húsi á Tvøroyri



*Her eru tað gomlu sýslumanshjúnini í Suðuroy, Eiler og Sigga Djurhuus, sum heilsa uppá vertin, Thomas Thomsen, sum stendur vinstrumegin*



*Eisini hesir tríggir høvdu leitað sær á móttøku, tá ið nýggja pubbin læt upp á Tvøroyri mánadagin*

**Á jóansøku fær stevnufólkið ein serstakan møguleika at sløkkja tostan**

PUB OG KAFÉ

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

T.F. Thomsen er søguligt handilsvirki á Tvøroyri. Og mánadagin var enn eitt nýtt kapittul í teirra longu handilssøgu.

Mánadagin læt nevniliga pubb og kafé upp í gomlu, kongligu krambúðini niðri á keiini á Tvøroyri.

Sostatt fær jóansøkufólkið í ár ein serstakan møguleika at sløkkja tostan í tí søguríkasta umhvøvinum á Tvøroyri.

Tá ið pubbin læt upp mánadagin vóru fleiri hundrað fólk inni á gólvinum. Men týsdagin var konglig vitjan í húsinum, har greitt var frá søguni hjá handlinum.

Síðani hevur verið opið fyri almenninginum og nú á jóansøku verður opið til klokkan fýra ánátt.

Annars er ætlanin, at hetta skal vera eitt hugnaligt stað, har tað skal bera til at seta seg eina løtu at fáa ein bita av onkrum og eina øl, ella eitt glas av víni afturvið.Tey hava eisini kaffi, te og kakur og so er eisini ætlanin at hava ymisk spøl, sum gestirnir kunnu hugna sær við. Ætlanin er eisini at hava tónleika-kafé av og á.

Saman við bygningunum er virksemið hjá Thomsen sostatt eitt umfatandi og virðismikið, søguligt savn, sum tey hjá Thomsen ætla skal gerast eitt livandi savn við teimum umvælingum, sum nú eru í umbúna tey næstu árini.

Annars er ætlanin at gera bygningarnar hjá Thomsen niðri á keiøkinum ístand, so at teir kunnu gerast eitt livandi savn við pub, kafé, mentanarhúsi, savni o.s.fr.